Viðmerkingar:

# Sjálvsstýris-tilgongdin mønustingin



Tað er harmuligt sum javnaðarmaður at ásanna, at málið um neyðugu broytingarnar í ríkisrættarstøðu okkara ikki fær eina veruliga og mannsømiliga viðgerð. Tjóðveldisflokkurin fekk so dyggiliga drigið Fókaflokkin og Sjálvstýrisflokkin upp á tráð.

Fyri umleið tjúgu árum síðan legði Javnaðarflokkurin upp til kjak um neyðugar broytingar í ríkisrættarstøðu okkara.

Uppskotið frá Javnaðarflokkinum hevði heiti Sjálvstýrislóg, og tað uppskotið er í høvuðsheitum endurgivið í faldaranum, sum flokkurin sendi til hvørt húsarhald í landinum.

Tíverri fekst ikki ljóð fyri Sjálvstýrislógini. Men harafturímóti eydnaðist tað Tjóðveldisflokkinum við síni víðgongdu og órealistisku kós at snara løgmann og fylgisveinar hansara, so at alt veruligt frælsi fyri føroyingar nú er farið langt út av sporinum.

Landsstýrið hevur so staðiliga prógvað, at loysingarleiðin er veruleikafjar, óklók og skaðilig fyri okkum sum fólk. Tað skaðiligasta er júst uttanumtosið. Hetta, ikki at greiða frá veruleikanum, men billa fólki inn, at lívsgrundarlagið og framburðsmøguleikarnir hjá okkum verða bestir uttanfyri ríkisfelagsskapin. Veruleikin er júst tann øvugti.

Eg haldi, at samgongan eigur at taka í egnan barm og viðurkenna, at fullveldisætlan teirra er miseydnað.

Sjálvstýrislógin hjá Javnaðarflokkinum má nú koma á skránna. Hinir flokkarnir mugu finna saman við okkum at tala um eina veruliga loysn á ríkisrættarviðurskiftunum.

Sjálvstýrislógin vísir á eina veruliga frælsisleið. Eftir henni skal eingin ivi vera um, hvør leggur framtíðarætlanir í føroyska samfelagnum. Tað skulu føroyingar sjálvir og eingin annar, tí eingin annar er betur førur fyri at avgera, hvat er gott fyri føroyingar, enn føroyingar sjálvir.

Men Sjálvstýrislógin skal samstundis staðfesta ein samstarvssáttmála millum Føroyar og Danmark, sum tvey sjálvstøðug og javnsett lond í ríkisfelagsskapi hvørt við annað.

Munurin á okkara uppskoti og samráðingaruppleggin um hjá landsstýrinum er fyrst og fremst, at føroyingar skulu ganga fram í øllum lutum. Vælferðarsamfelagið skal ikki skerjast, men mennast. Búskaparstøðan skal styrkjast og skipast á skilagóðum støði, soleiðis at hetta samfelagið í mest møguligan mun gerst búskaparliga sjálvbjargið.

Høvuðsmálið í Sjálvstýrislógini er, at vit ikki lata burturav okkara rættindum í ríkisfelagsskapinum, men harafturímóti í felagsskapi í ríkinum vinna borgarum bestu møguleikar. Men málið er ikki minni, at tað eru føroyingar sjálvir og eingin onnur tjóð, ið ger av, hvat er best fyri hetta land og hetta fólk. Tí vilja vit gera ein sáttmála millum londini, sum gevur okkum javnbjóðis rætt og skyldu í felags ríkinum. Hetta ber til. Hetta er ein møguleiki, sum kann setast í verk.

**Hans Jørgensen**

**Lesið eisini Sosialin á Internetinum**

**www.sosialurin.fo**

# Eftirlýsing: Sakligur politiskur hugburður

*Tað mugu vera mong við mær, ið eftirlýsa eitt meira sakligt po1litiskt umhvørvi í Føroyum. Hugburðurin hjá stórum parti av føroyskum politikarum tykist at verða alt ov snævursýntur og ósakligur. Neyðugt er við eini broyting í hugburðinum í føroyskum politikki til tess at koma burtur úr hesi støðu, fyri heldur at stíla ímóti meira mennandi og málrættaðum politikki til frama fyri føroyska samfelagið.*

**Politiski hugburðurin**

Undir yvirskriftini 'ætlar at selja almennar ognir fyri at fíggja fullveldi' royndi Jóannes Eidesgaard mikudagin, í Sosialinum, at føra fram hugsjónir sínar um Ólavsøkurøðuna. Eingin ivi skal valda um, at Jóannes Eidesgaard, bert hevði eittans endamál við sínum úttalilsum í hesu grein, nevniliga at finnast at so nógvum sum møguligt og enntá koma við úttalilsum, ið ganga beint ímóti betur vitan, fyri síðan als ikki at koma við nøkrum uppskoti til, hvussu tingini kundu verið gjørd á annan hátt. Endamálið er eittans, at vanvirða landsstýrisarbeiðið og at skapa ótryggleika millum fólk.

Tílíkur framferðarháttur kann ikki sigast annað, enn at verða tekin um ósakligan atburð. Men Jóannes Eidesgaard er langt frá tann einasti. Manggan hevur verið nevnt, at tað jú er uppgávan hjá andstøðuni at koma við atfinningum. Tað er nakað um tað, men her má ein misskiljing verða komin í. Tað at andstøðan skal koma við mótspæli og grundgivnum atfinningum er púra rætt, men hetta kann als ikki javnstillast við vanvirðing og ósakliga viðgerð.

Hví tykist hugburðurin í føroyskum politikki at verða tann, at andstøðan skal vanvirða og finnast harðliga at meirlutanum av tí, ið samgongan kemur við av málum ? Kann tað verða rætt, at nærum helvtin av fólkavaldu politikarunum skulu nýta eitt ella fleiri valskeið til hetta endamálið ?

Vit síggja í øðrum londum, serstakliga í londum við minnilutastjórnum, at andstøðu- og samgongupolitikarar samstarva um flest øll mál tvørtur um flokkar og hugsjónir, tí endamálið hjá fólkavaldum politikarum er júst at bera so í bandi, at teir arbeiða til frama fyri, at fáa skilagóð mál framd til frama fyri alt landið og alt fólkið.

Í Føroyum verður tíverri arbeitt í einum heilt øðrvísi politiskum umhvørvi. Ávísir politikarar hava enntá úttalað seg um, at teirra einasta endamál í løgtinginum er at fella landsstýrið. Hetta er bert eitt av mongum dømum um, at hóast tað kann tykjast sum politiska umhvørvið er vorðið eitt sindur meira sakligt undanfarnu árini, so er enn langt á mál, áðrenn vit fáa ta broyting í politiska hugburðinum, ið er neyðug, fyri at fremja eitt meira mennandi politiskt umhvørvi og harvið fáa meira sakligan politikk.

**Orð og gerð – ikki hond í hond**

Tað er tó ikki bert andstøðan, ið ger sítt til, at føroyskur politikkur ikki verður tikin í nóg stórum álvara millum manna. Eisini samgongan hevur torført við at varðveita sítt trúvirðið millum manna. Hóast arbeitt verður fram móti einum felags málið til frama fyri allar Føroyar, nevnliga fullveldi, so er tað tíverri ikki altíð at orð og gerð fylgjast at. Tá ið samgongan hevur sett sær eitt mál, ið er, at Føroyar skulu gerast eitt samhaldsfast sjálvstøðugt samfelag, átti politikkurin at verið har eftir. Heldur enn at nýta pening til fríðkan av tinghúsi, undirsjóvartunnlar, skattalættar v.m., átti peningurin verið nýttur at yvirtaka tey fáu økini, ið enn eru á donskum hondum, og hartil til at bøta um tey øki í samfelagnum, ið hava stórstan tørv á hesum. Bert á henda hátt vilja orð og gerð fylgjast hond í hond, og bert á henda hátt vil álitið á føroyskar politikarar og fullveldisætlanina sum heild gerast størri.



**Politikkur — álvara ella gaman ?**

Lurtar ein eftir orðaskiftinum í tinginum, nú um dagar, er heldur ikki ov nógv saklig viðgerð at finna. Í alt ov nógvum førum eru ta ógrundaðar meiningar, ið síggja dagsins ljós í tinginum. Alt ov ofta ber orðaskiftið eisini brá av, at talarin ikki hevur kunnað seg nóg væl um málið. Hetta er enn ein orsøk til, at føroyskur politikkur ikki verður tikin í nóg stórum álvara.

Enn ein trupulleiki, ið eisini má komast burtur frá í føroyskum politikki er tann altíð afturvendandi økispolitikkurin. Politikarar, ið ynskja at føra økispolitikk, áttu at hildið seg til at verða kommunalpolitikarar, meðan landspolitikarar eru valdir til at arbeiða til frama fyri alt landið. Hetta er sjálvsagt, men ikki allir politikarar tykast at hava skilt hetta býtið.

Komið kundið verið inn á nógvar aðrar trupulleikar í føroyskum politikki, men farið eg ikki at koma inn á fleiri her. Niðurstøðan er, at eg — og uttan iva mong við mær - eftirlýsi eina broyting í hugburðinum í føroyskum politikki til tess, at menna eitt meira sakligt politiskt umhvørvi og harvið sakligan politikk í Føroyum.

2. august 2000

**Kristina Háfoss**

# Færinger trækker Danmark ned i sølet?

Nylig fant jag i BT en artikel med to tilskrifter under teamet »Færinger trækker Danmark ned i sølet«.

Lit mer enn 30 år tilbake studerede jeg øygruppens histori og kultur og skrev lit senere om denne også en artikkel i det tidligere østtyskland. Færøerne har været en gang for oss her et ukjent land. Den gang hadde befolkningen ingen mulighet å reise til vestlige land. Men forskjellige mennesker ønskede, at jeg må holde foredrag om dette. Jeg smugglede in Bildmaterial og skaffede mange diapositiv. Mellem 1972 og 1990 holdt jeg mange foredrag i hele DDR, uakted at jeg så øygruppen før aldri. Riktignok kritiserede jeg alltid hvalfangst og hvalslakteri.

Efter Tyskland foreningen fikk jeg 1991 en indbydelse om å besøke Færøerne. Jeg besøkte nærmast alle kommuner og snakkede med mange mennesker, men jeg så bl.a. også hvaljagt og hvalslakteri i Sørvági. Riktignok fikk jeg ved siden av også snakke om dette. Resultat: Arbeiderfolk kan ikke bare spise Mc Donald-mat, torsk og laks eller sjøfugler, de vil også spise mat med flæsk! Å holde grise på Færøerne er umulig, de ville dø pga. vinden. Dette er grunnen å bruke hvalflæsk.

Ikke sjelden propagerer fremmede ikke bare kritik, men fordre også vareboykott, ofte også mot Danmark. Men disse mennesker kritiserer uten å kjenne orsaken. Et tysk ungdomstidskrift skrev en gang om færingerne, at disse er ond i masken drukne monster.

Efter hvalslakteri får båtsbesettninger fangstandeler, men likeså eldre, enker og foreldreløse barn. Jeg finner dette sosialt!

Befolkningen er ikke mer enn 45000 personer og ikke så mange spiser hvalkjøtt, i dag per uke bare en gang. Hvalkjøtt er smittet med tungmetall! Handel og eksport gir det ikke, alt er bare for egen befolkningen.

Men hvorfor protesterer ingen mot Norge eller Japan, uakted at begge stater dræber storhvaler, uakted at dette er forbudt! Japan snyder verden med »pga vitenskapelig grunnen«, uakted at hvalkjøtt finns snart i blanding restauranter.

Men ikke å glemme: Færøernes befolkning er lit mot muslimske befolkningen i verden og hvordan dræber denne sauer, geiter eller kameler? Likesom færingerne grindehvaler, men ingen protesterer! Og hvordan gør jødgerne dette?

Vi skulle ikke skyde med kanoner på spurver!

**Karl-Heinz Schöne**
**Feberbachstr. 11**
**D-06114 Halle**
**Tyskland**





# Nú skal bera betur til at uppkalla

*Navnalógin, ið varð samtykt fyri átta árum síðan, setti fyri fyrstu ferð mørk fyri, hvørji nøvn kundu gevast børnum. Men tíðum nokkso strangu reglurnar hava givið trupulleikar, tá børn skulu uppkallast, og tað verður nú tikið til eftirtektar*

Rúnar Reistrup

At kalla hvørja viku fær navnanevndin, ið umsitur navnalógina, umsókn um loyvi at brúka okkurt navn, ið ikki stendur á tí góðkenda almenna fólkanavnalistanum.

Er navnið, ið søkt verður um, í samsvari við føroyskar málreglur annars, verður loyvi givið, men víkir tað frá hesum, er eingin bøn.

Av tí sama fær landsstýrið rættiliga nógvar klagur, og tað er ein av orsøkunum til, at navnalógin frá 1992 nú verður endurskoðað.

Anfinnur Johansen av Føroyamálsdeildini á Fróðskaparsetrinum er formaður fyri navnanevndini og limur í seks manna nevndini, ið er sett av landsstýrinum at gera uppskot til broytingar í navnalógini.

Nevndin leggur í løtuni síðstu hond á arbeiðið.

Nevndaruppskotið inniber sambært Anfinni Johansen millum annað, at tað í størri mun skal gerast møguligt at uppkalla børn eftir eitt nú ommum og abbum teirra.

**Fyrilit tikið fyri uppkalling**

Sum nú er stendur í paragraff eitt í navnalógini sum einasta treyt fyri, at eitt navn verður góðkent, at „navnið skal vera í samljóði við føroyskar málreglur".

Her verður altso ikki tikið fyrilit fyri, um serligar umstøður liggja til grundar fyri einum navnaynski.

Nevndin, sum ger uppskot til broytingar, arbeiðir út frá ynskinum hjá landsstýrinum um, at fyrilit eisini verður tikið fyri grundgevingunum fyri umsóknum um loyvi at nýta einstøk nøvn.

– Við broytingaruppskotinum leggja vit upp til, at koma umsóknir um nøvn, ið verða grundaðar við at barnið skal uppkallast eftir onkrum í familjuni, so verður tað tikið við í viðgerðini, sigur formaðurin fyri navnanevndini.

**Skal vera føroyskt**

Men føroysku málreglurnar skulu sambært broytingaruppskotinum eisini í framtíðini fyrst og fremst liggja til grundar fyri góðkendu nøvnunum.

Um abbin til dømis æt Sigmund, og foreldur hava hug at uppkalla son sín Sigmund, fer broytta navnalógin ikki at geva heimild til tess. Sigmund er ikki í samsvari við føroyskar málreglur, men tað er navnið Sigmundur hinvegin. Tískil fer loyvi ikki at verða givið til at sonurin skal eita Sigmund, hóast hetta er navnið á abbanum.

Eitt hugsandi dømi, har broytingarnar í navnalógini kunnu loyva einari uppkallan, er um omman eitur Bodil.

Sambært galdandi reglum ber ikki til at kalla til dømis eina ommudóttir fyri Bodil eftir ommuni. Navnið stendur ikki í listanum fyri góðkend nøvn, og loyvi verður heldur ikki givið um søkt verður um tað.

Her verður víst til føroyska navnið Bóthild, sum stendur á listanum. Bodil er danski formurin av Bóthild. – Men Bóthild liggur nakað langt frá Bodil, og tá kundi hugsast at loyvi fór at verða givið til at kalla eina gentu Bodil, um so var at umsóknin var grundað á, at til dømis omman æt Bodil, sigur Anfinnur Johansen.

Bodil er sum orð nevniliga í samljóði við føroyskar málreglur, hóast navnið í sær sjálvum ikki er føroyskt.

Hinvegin fer abbasonur ein Christian ikki at fáa loyvi til at fáa navnið Christian, men má heldur kallast Kristian. Her er eingin annar munur millum nøvnini enn stavsetingin, og tí verður danski formurin ikki góðtikin.

**Navnalistin skal vera vegleiðandi**

Higartil hevur mannagongdin verið tann, at um navnanevndin einaferð hevur givið loyvi til at kalla eitt barn við navni, ið ikki var nevnt í listanum yvir góðkend nøvn, so høvdu øll rætt at kalla barn sítt viðkomandi navn.

Men í uppskotinum til broytta navnalóg verður sligið fast, at eitt navnaloyvi, ið er givið einum umsøkjara, ikki hevur við sær at navnið verður givið leyst til øll at brúka.

Taka vit dømið um Bodil og Bóthild fram aftur, so er tað bert tey, ið vilja uppkalla eina Bodil í ætt síni, ið kunnu fáa loyvi at nýta hetta navnið. Annars skulu fólk brúka føroyska formin, Bóthild.

Fleiri aðrar smærri broytingar eru við í uppskotinum til endurskoðaða navnalóg, men tann mest umfatandi broytingin, ið uppskotið leggur upp til, er at reglurnar um góðkend fornøvn verða linkaðar nakað.

Hvussu broytta lógin fer at síggja út, er ikki greitt enn, tí uppskotið er ikki liðugt orðað enn, og nógv kann henda við uppskotinum, tá tað verður lagt fyri tingið í heyst.

# Maria og Jákup tey vanligastu

*Hóast navnanevndin fyri átta árum síðan gjørdi ein fjølbroyttan lista við alskyns nøvnum, ið sjáldan ella ongantíð høvdu verið at sæð fyrr, so eru tað enn tey meira vanligu nøvnini, ið eru best umtókt og soleiðis halda fram at vera tey vanligastu føroysku nøvnini.*

Rúnar Reistrup

»Hvussu skal barnið eita?« spyr prestur, og so verður svarað.

Tað svarið, ið oftast er komið fyri, síðan navnalógin kom í gildi í 1992 og fram til árslok 1998, er Maria.

45 gentubørn hava fingið hetta navnið millum 1992 og árslok 1998. Harafturat hava 60 gentubørn fingið navnið Maria sum seinna fornavn - tildømis sum Anna Maria.

Vanligasta dreingjanavnið hevur verið Jákup. Navnið fingu 50 dreingjabørn í tíðarskeiðnum 1992-98. Harafturat hava 24 dreingjabørn fingið navnið Jákup sum seinna fornavn.

Hesi bæði nøvnini eru traditionel føroysk nøvn, ið stava frá kristindóminum.

Við fólkateljingini í 1801 ber til at síggja, at tá lá navnið Jákup sum nummar tvey á listanum yvir vanligastu mannfólkanøvnini í Føroyum. Tað vanligasta tá var at eita Jógvan.

Navnið Maria var í 1801 nummar átta á listanum yvir vanligastu konufólkanøvn í Føroyum. Tá var Anna nógv tað vanligasta. Heili 552 av teimum tá 2624 kvinnunum í landinum bóru tá navnið Anna.

Á listanum yvir mest brúktu nøvn í tíðarskeiðnum 1992-98 var Anna tað næst mest nýtta konufólkanavnið.

Sum heild eru tað nógv nøvn, sum ganga aftur í navnalistanum frá 1801 og listanum yvir nøvn, ið givin eru børnum millum 1992 og 1998.

# Stórnavn spælir í Gøtu

*Í kvøld verður konsert í Losjuni í Gøtu, har landskendu Kári Sverrisson og Ivory og heimskendi John Purcell fara at spæla.*



*Saxofonisturin John Purcell hevur spælt saman við nógvum kendum fólkum innan jazz- og popptónleik. Í kvøld spælir hann í Losjuni í Gøtu*

Rúnar Reistrup

Í hesum døgum venur ein víðagitin saxofonistur saman við jazzbólkinum Ivory. Venjingin fer fram í Gøtu og er fyrireiking til tríggjar framførslur, sum saxofonisturin John Purcell og Ivory fara at hava saman komandi dagarnar.

Tann fyrsta framførslan verður í kvøld í Losjuni í Gøtu, sum er blivið eitt tað mest blómandi tónleikaforumið í landinum.

Saxofonisturin John Purcell er amerikanari uppvaksin í New York. Hann starvast á California State University á deildini fyri tónlist, men hevur kortini so leysar teymar, at hann fær tíð til eitt sindur av hvørjum við síðuna av.

Og tað er ikki so lítið, John Purcell, hevur fingið av skafti. Hann spælir við á fleiri enn hálvtrýss tónleikaútgávum og ikki bara hjá hvørjum sum helst.

Millum tey, hann hevur hjálpt at innspæla fløgu, teljast Paul Simon og Bill Cosby, millum filmsleikstjórarnar hann hevur arbeitt fyri eru Francis Ford Coppola og Spike Lee, og hann hevur staðið á palli saman við millum øðrum Dizzy Gillespie, Stevie Wonder og David Sanborn. Í kvøld spælir John Purcell saman við Ivory í Losjuni í Gøtu, har eisini Kári Sverrisson verður at hoyra.

**Ivory til California**

Tað var eitt sindur tilvildarligt, at John Purcell endaði í Føroyum fyri fyrstu ferð fyri lítlum ári síðan. Kristian Blak fekk ein eysturríksan tónleikabólk higar. Men ein av manningini gjørdist sjúkur, og fyri hann fekk bólkurin lokkað John Purcell við.

Hann gjørdist bergtikin av Føroyum, og játtaði at koma aftur í sambandi við Jazzfestivalin, ið byrjar í komandi viku. Har spælir hann eisini saman við unga føroyska jazzbólkinum Ivory.

Vegna California State University, har hann starvast hevur John Purcell tikið stig til eitt samstarv millum føroyskar tónleikarar og tveir tónleikarar á tónlistadeildini á universitetinum, sum eru við honum á ferðini til Føroya.

Ætlanin er at bólkurin Ivory skal við honum til California einaferð seinni.

Ivory, John Purcell og Kári Sverrisson fara á pallin í Losjuni í Gøtu í kvøld klokkan 21. Í annaðkvøld spæla Ivory og John Purcell í Meiarínum í Havn, og mikukvøldið spæla tey á Jazzfestivalinum.